NÓSI HEVUR FØÐINGARDAG

Til lukku, NÓSI



Nósi heldur føðingardag frá mánadegnum 6. til fríggjadagin 10. september!
Hetta tíðarskeið vitjar hann allar Føroya Bankadeildirnar.




Ferðaætlan hjá Nósa kring oyggjarnar

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | | | |
| **Klaksvík** | týsdagin | 7-9-2004 | kl. 10.30-11.00 og kl. 14.30-15.30 |
| **Eysturoy** | | | |
| **Leirvík** | mánadagin | 6-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |
| **Gøta** | mánadagin | 6-9-2004 | kl. 13.00-14.00 |
| **Eiði** | mánadagin | 6-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |
| **Norðskáli** | týsdagin | 7-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |
| **Fuglafjørður** | mikudagin | 8-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |
| **Saltangará** | hósdagin | 9-9-2004 | kl. 10.30-11.00 og kl. 16.30-17.30 |
| **Toftir** | hósdagin | 9-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |
| **Strendur** | fríggjadagin | 10-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |
| **Skáli** | fríggjadagin | 10-9-2004 | kl. 13.00-14.00 |
| **Vágar** | | | |
| **Miðvágur** | hósdagin | 9-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |
| **Sørvágur** | hósdagin | 9-9-2004 | kl. 16.00-17.00 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Sandoy** | | | |
| **Skopun** | fríggjadagin | 10-9-2004 | kl. 14.00-14.30 |
| **Sandur** | fríggjadagin | 10-9-2004 | kl. 15.00-15.30 |
| **Suðuroy** | | | |
| **Vágur** | mánadagin | 6-9-2004 | kl. 14.00-15.00 |
| **Hvalba** | týsdagin | 7-9-2004 | kl. 13.00-14.00 |
| **Tvøroyri** | týsdagin | 7-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |
| **Streymoy** | | | |
| **Kollafjørður** | týsdagin | 7-9-2004 | kl. 13.00-14.00 |
| **Vestmanna** | mikudagin | 8-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |
| **N. Finsensgøta** | hósdagin | 9-9-2004 | kl. 10.30-11.30 og kl. 16.30-17.30 |
| **Hornabøur** | hósdagin | 9-9-2004 | kl. 13.00-14.00 |
| **SMS** | hósdagin | 9-9-2004 | kl. 14.30-15.30 |

**Kom inn á gólvið og hav sparikistilin við, so seta tú peningin inn á tína Nósakonto og tú fært eitt flott bikar heim við!**



www.nosi.fo

FØROYA BANKI





Sølufólk til urtagarðsdeildina

Til broytta handil okkara í Tórshavn, ið letur upp uml. 15. nov 2004, sóknast vit eftir fólki at taka sær av urtagarðsdeildini.

Urtagarðsdeildin er ein nýggj deild, ið fer at bjóða kundum okkara eitt breitt úrval av vørum til fríðkan av urtagarðinum, so sum vanlig amboð, maskinur, plantur, fræ og leykir, betongflísar, møblar og annað í hesum sambandi.

Um starvið er at siga, at tú saman við hjálparfólki skal røkja og taka tær av øllum dagligum uppgávum á deildini, so sum sølu og vegleiðing, innkeyp, prísáseting og aðrar uppgávur í hesum sambandi.

Vit eru vís í at vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv, har tú veruliga sleppur at royna tíni evni.

**Okkara krøv til tín eru:**
- at tú hevur áhuga fyri og eina rímiliga breiða vitan um ella útbúgving innan økið
- at tú hevur royndir/útbúgving innan handilsvinnu
- at tú ert nærløgd/-lagdur og røkin
- at tú hevur góð samstarvsevni

Løn og arbeiðistíðir verða avtalaðar við tann, ið sett/ur verður.

**Umsóknin skal sendast til:**
Timburhandilin
Heykavegur 4, box 3038
110 Tórshavn

Umsóknarfreist: 15. september 2004.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN
TÓRSHAVN • KAMBSDALUR




Rúsevnaráðstevna:

# Ølsølur ikki bodnar við

**– Útlendsku gestirnir mundu uttan iva undra seg yvir, at ongin frá okkara yrki var við á skránni hjá rúsevnaráðstevnini fyrr í vikuni. Men vit vóru tíverri ikki bodnir við, sigur Johan Mortensen, stjóri á Restorffs Bryggjarí**

RÚSDREKKA/-FYRIBYRGING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




Tjúgunda norðurlendska rúsevnaráðstevnan var í ár hildin í Føroyum. Stevnan endaði týsdagin, og eitt av høvuðsevnunum tann dagin var evnið "Ábyrgdarfull skeinking". Svensku og norsku umboðini høvdu drúgvar fyrilestrar um fyribyrgjandi átøk í hesum sambandi, og í báðum londum spældi leikluturin og samstarvi við matstovur og vertshús ein høvuðsleiklut í átøkunum. Men úr Føroyum var ongin, sum umboðaði hvørki matstovur ella onnur skeinkistøð.

– Orsøkin til, at at ongin frá Restorffs Bryggjarí var at síggja, var at vit ikki vóru bodnir við. Og tað undrar meg stórliga, tí tað mátti verið upplagt at, at okkara sjónarmið eisini vóru umboðað á eini slíkari ráðstevnu, sigur Johan Mortensen.

## Kenna stóra ábyrgd

Tað var Fyribyrgingarráðið í Føroyum, sum skipaði fyri árligu stevnuni, sum hevur til endamál at menna norðurlendska samstarvið um fyribyrging av misnýtslu av rúsdrekka og rúsevnum og at kunna um gongdina á alkoholpolitisku økinum í Norðurlondum sum heild.

– Eg havi allarstørstu virðing fyri arbeiðinum, sum Fyribyrgingarráðið og onnur gera á hesum økinum, og eg haldi tað vera eitt frálíkt hugskot við hesum ráðstevnunum. Men tá ongin frá skeinkistøðunum er boðin við, fert tú at spyrja teg sjálvan, hvørjum ein slík stevna er ætlað, sigur Johan.

– Sum øll onnur vita vit sjálvandi, hvussu syndarligar avleiðingar ovurnýtsla av rúsdrekka kann hava. Og ongin skal vera í iva um, at vit sum framleiða og skeinkja hesa vøru, kenna stóra ábyrgd fyri, hvussu hon verður brúkt. Vit vilja heldur enn fegnir vera við í tí fyribyrgjandi arbeiðnum, og tí harmast vit um, at Fyribyrgingarráðið ikki hevur vent sær til okkum í hesum spurningum.

## Markað avgjald

Johan leggur afturat, at teir á Restorff's ofta hava tosað um, hvussu fyritøkan kundi átikið sær ein størri leiklut, tá tað ræður um fyribyrging av ovurnýtslu av rúsdrekka. Tað kundi verið gjørt uppá ymsar mátar, men sjálvur heldur Johan, at tað hevði veri eitt fínt hugskot, at sett ein part av tí høga ølavgjaldinum av til fyribyrgjandi arbeiði.

– Ein stovnur sum Fyribyrgingarráðið hevur neyvan alt ov nógvar pengar at arbeiða við. Eftir mínum tykki átti tað at verið upplagt at markað nakrar av øllum hesum milliónunum til arbeiði hjá einum slíkum stovni.

## Positivt rák

Johan vísir á, at donsk bryggjarí leggja nógvar pengar og orku í tað fyribyrgjandi og upplýsandi arbeiði, og eins og í Svøríki og Noreg er ongin longur í iva um, at tað gevur úrslit.

– Tað ber til at broyta hugburðin hjá fólki – eisini tá tað ræður um nýtslu av rúsdrekka. Alt bendir í løtuni til dømis á, at fólk heldur drekka veikt øl og vín enn sterkt rúsdrekka. Tað er uttan iva eitt tekin um, at fólk í størri mun seta tað at drekka í samband við njótilsi og hugna heldur enn at drekka seg full.

Hetta er eitt positivt rák, sum vit sjálvandi eiga at stimbra, meðan vit hava møguleikan. Sum landsstýrismaðurin í heilsu- og almannamálum segði, so eru trupulleikarnir av misnýtslu ikki nakað, sum fer burtur við at lata eyguni aftur. Fyrsta treytin er, at vit tosa opið um hetta evnið – og tað krevur, at øll sjónarmið sleppa framat, sigur stjórin á Restorff's at enda.

Føroya Bjór:

# Vildu fegnir verið við

RÚSDREKKA/-FYRIBYRGING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



Frá Føroya Bjór frætta vit, at heldur ikki bryggjaríið í Klaksvík fekk nakra innbjóðing til norðurlendsku rúsevnaráðstevnuna. Einar Waag stjóri á Føroya Bjór dugir ikki at siga, hví bryggaríini ikki vóru boðin við á hesa ráðstevnuna, tí tey hava fyrr verið við í samstarvi um fyribyrging av misnðtslu.

## Trupult at gera vart við seg

– Eg havi við stórum áhuga lisið tað, sum hevur verið at frætta frá ráðstevnuni, tí vit hava sjálvandi áhuga í at fylgja við í og læra av teimum royndum og úslitum, onnur Norðurlond hava rokkið á hesum økinum, sigur Einar Waag.

Einar leggur afturat, at teir sjálvandi ongan áhuga hava í at fólk misnýta rúsdrekka, og at teir eisini ynskja minst líka nógv, sum øll onnur, at alt gongur so siðiliga fyri seg á skeinkistøðunum, sum til ber.

– Men so leingi tað ikki er loyvt bara at nevna øl í lýsingum, fáa vit ikki sjálvir gjørt vart við okkum – heldur ikki í fyribyrgjandi átøkum. Tí vilja vit fegnir samstarva við onnur í hesum spurningum, sigur Einar Waag.

Gistingarhús- og matstovufelagið:

# Eftirlýsa størri samskifti

SKEINKIUMHVØRVI
*Anna V. Ellingsgaard*



Uni Danielsen, formaður í Føroya Gistingarhús og matstovurfelag skilir heldur ikki rættilga, hví felagið ella aðrir loyvishavarar ikki vóru umboðaðir á rúsevnaráðstevnuni.

Tað eru jú vit, sum standa í hesum dagliga, og vit hava leingi tosað um, at skipa fyri skeiðum fyri okkara starvsfólkum um, hvussu tey best handfara rúsaðar persónar og truplar støður í samband við skeinking. Sum eg skilji, kundu vit uttan iva lært nógv av samstarvinum millum restauratiónsvinnuna og aðrar stovnar í til dømis Noreg og Svøríki. Ein slík ráðstevna hevði verið eitt avbera gott høvi hjá okkum í hesum yrkinum at komið fram við okkara royndum og sjónarmiðum, sigur Uni og leggur afturat, at felagið altíð er opið fyri einum positivum samskifti við bæði Fyribyrgingarráð og aðrar myndugleikar, ið vara av økinum.

Tað eydnaðist tíverri ikki at fáa eina viðmerking frá Fyribyrgingarráðnum, áðrenn blaðið fór til prentingar.